# HS kapping 05. februar 2011

# Bólkur 1 - 4

Tilmeldingarnar skulu sendast til Svend Åge Seloy á mail - saseloy@gmail.com í seinasta lagi mikudagin 02. febr. kl. 20.00.

Tað verður møguligt at keypa heitan mat í døgverðasteðginum. Kostnaðurin er kr. 50,- /stk.
Talið á teimum sum ynskja sær ein døgverðabita, skal mailast til undirritaða á mail: jja@lm.fo í seinasta lagi mikukvøldið kl. 20.00. Gjaldast kann við kortið á staðnum ella flytast á konto hjá HS.

Kappingin endar uml. kl. 15.00, soleiðis at suringarnir hava møguleika fyri at náa bátin suður kl. 16.00.

**Upphitingin fyrrapartin byrjar kl. 08.30**

**Kappingarnar vera hesar:**

| **Fyrrapart** | | **Seinnapart** | |
|---|---|---|---|
| 1 & 2 | 50 firvald | 15 & 16 | 50 rygg |
| 3 & 4 | 100 rygg | 17 & 18 | 100 blandað |
| 5 & 6 | 50 frí – bein * | 19 & 20 | 50 bringu – bein* |
| **15 min. steðgur** | | **15 min. steðgur** | |
| 7 & 8 | 50 bringu | 21 & 22 | 50 frí |
| 9 & 10 | 100 frí | 23 & 24 | 100 bringu |
| 11 & 12 | 50 rygg – bein ** | 25 & 26 | 50 firvald – bein * |
| **10 min. steðgur** | | **10 min. steðgur** | |
| 13 & 14 | 4 x 50 frí | 27 & 28 | 4 x 50 blandað |

*** STARTUR:** Byrjað í hylinum. Halda við aðrari hondini í startskammilin og hin hondin á svimjiplátuni.
*** VENDING:** Nerta við kantin við báðum hondum meðan hildi verður við báðum hondum í svimjiplátuna. Tað er loyvt at sleppa plátuni við aðru hondini, tá vent verður.

**** STARTUR & VENDING:** Sum vanligt í ryggsvimjing og svomið verður við ørmum yvir høvd (streamline).
**** VENDING:** Loyvt er at taka eitt armtak, tá vent verður frá rygg til búk, sum vanligt í ryggsvimjing.
Loyvt er at svimja 15 metur undir og brúka firvalda- ella fríbein aftaná start og vending.

## Hvørt felag skal hava 3 hjálparfólk við!

Vinarliga

**Havnar Svimjifelag**
Jákup Jacobsen, tlf.: 291234 og mail: jja@lm.fo